DAGSINS MEINING

Børn, ferð og ferðsla

Seinastu tíðina hevur ferð og ferðsla verið viðgjørd í føroysku miðlunum. Eitt nú hoyrdu vit forkvinnuna í Ferðslutrygd mæla til, at ferðslulógin varð broytt soleiðis, at til skal bera at kunna koyra skjótari á ávísum strekkjum.

Vit hava seinastu tíðini verið vitni til, at broytingar eru gjørdar í ferðslulógini, sum eru til tað verra. Eitt nú, at vit nú sleppa lættari, tá vit koyra ov skjótt ella um vit koyra bil ávirkað av rúsdrekka - skilt á tann hátt, at tú fært treytaða frádøming av koyrikorti. Hetta eru óhepnar avleiðingar,ið ikki eru til gagns fyri ferðsluna.

Tað er staðfest fleiri ferðir, at ferð drepur. Hægri ferðin er, størri gerast avleiðingarnar, tá skaðin hendur. Tað er tí ikki rætt at tosa um at hækka ferðina á føroysku landavegunum. Heldur eiga vit at vísa fólki, at tað er ríkiliga skjótt at koyra 80 km/t á landsvegunum.

Um nakrar dagar byrja skúlarnir aftur. Fleiri hundrað børn og ung fara út aftur í ferðsluna. Nøkur av hesum fara í skúla fyri fyrstu ferð. Við skúlaársbyrjan veksur ferðslan tí uppaftur meira, og er tað tí sera umráðandi, at vit øll við hesum í huga eru serliga varin í ferðsluni.

Ein trupulleiki er, at nógvir skúlar standa við vegir, har nógv ferðsla er. Hetta er ein veruleiki, sum bý- og bygdarráð eiga at gera nakað við soleiðis, at ferðslutrygdin altíð verður havd í huga.

Aðalhugsjónin um nullhugsjónina, har sagt verður, ein eingin skal doyggja ella verða illa skaddur í ferðsluni, er sera góð. Men fyri verurliga at kunna stíla ímóti hesum máli er neyðugt, at vit øll taka tøk saman. Bý- og bygdamyndugleikar eiga at gera ferðsluviðurskiftini so trygg sum gjørligt, og eru skúla og barnagarðar uppløgd høvi at vísa hetta í verki.

Okkara lógarsmiðir eiga eisini at hava hetta í huga, tá ferðslulógin verður broytt. Hugað eigur at verða um, at allar broytingar skulu hava til endamáls, at null-hugsjónin verður havd sum stevna. Broytingar, sum at økja um ferðina á landsvegnum, ella at treytaðar dómur fyri promillukoyring ella fyri at koyra ov skjótt, bera ikki á hendan bógvin.

Tað er ein hugburðsbroyting, sum skal til. Vit skulu øll ferðast í ferðsluni, og skulu øll sýna hvør øðrum fyrilit.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Positivar broytingar á eldraøkinum í Eysturoy

– svar til Súna í Hjøllum frá Hans Pauli Strøm, landsstýrismanni

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

Súni í Hjøllum setir í lesarabrævi 4.8.04 undirritaða nakrar spurningar viðvíkjandi heimarøktini í Eysturoynni. Spurt verður, um tænastuveitingin er nøktandi, tá ið Heimarøktin í summum førum ikki er før fyri at veita reingerð í juli og august mánaða, og um tað er rætt skilt, at eldrasambýlini eru so undirmannað, at tað er neyðugt at biðja tey avvarðandi hjálpa til.

Tað er rætt, at onkur heim í Eysturoynni ikki fáa ta vanligu reingerðina nú í summarfrítíðini. Hetta er gjørt í eini prioritering, har heimarøktin hevur mett hetta at vera forsvarligt í mun til t.d. at skula skerja tænastuna til persónliga rokt. Prioriteringin er eisini gjørd við fyriliti fyri heimligu og familieru umstøðunum hjá tí einstaka. Reingerðin er tí ikki skorin yvir ein kamb, tað snýr seg uml. ein triðing av teim brúkarunum, sum vanliga hava fingið reingerð. Tað vil siga, at tey flestu heimini fáa reingerð sum vanligt, og nøkur eru skerd eitt tíðarskeið.

Høvuðsorsøkin til hesar prioriteringar er, at tað eru færri fólk til arbeiðis, meðan summarfrítíðin er, samstundis sum arbeitt verður við at manna tey nýggju sambýlini, ið skulu lata upp í næstum við einum parti av teim starvsfólkunum, sum longu arbeiða í heimarøktarskipanini, og avgerast skal, hvussu nógv fólk skulu setast aftrat. Hetta er ein kabala, sum skal ganga upp, saman við eini ávísari óvissu um, hvussu nógvir og hvørjir brúkarar fara á sambýlini at búgva (og hvat hetta kemur at merkja fyri restina av virkseminum).

Tað er ein sannroynd, at summarferiutíðin er ein ring tíð viðvíkjandi starvsfólkaorku, tí at trýstið á skipanina er so stórt, og vanliga skilja brúkararnir, at tað onkuntíð kann gerast neyðugt at skerja tænastuna í ávísan mun í ávísum tíðarskeiðum. Heimarøktarskipanin er ikki vitandi um stórvegis trupulleikar, og ongin brúkari í økinum hevur klagað til heimarøktina og víst á sína ónøgd við tænastuna.

Sambært Heimarøktini er ongin broyting í manningini á sambýlunum í hesum tíðarskeiði í mun til ta manning, ið vanliga hevur verið nýtt undanfarin ár. Tað, at avvarðandi, tá til ber, eru um síni undir serligum umstøðum, hevur eisini verið vanligt allar tíðir á árinum, og hevur hetta verið púra náttúrligur partur av arbeiðinum, tá hugsað verður um okkara siðaarv, við tøttum familjubondum, og eitt tekin um samstarv millum teir partar, sum eru um tann, ið tørvar hjálpina.

Tað henda stórar positivar broytingar á eldraøkinum í Eysturoynni í ár og eisini komandi ár. Nú eftir summarsteðgin lata tey nýggju 5 plássini upp á Eiði og tey bæði nýggju sambýlini á Toftum við 16 plássum og Leirvík við 10 plássum, og so seinni í heyst tað í Gøtu við 10 plássum. Haraftrat er heimarøktan involveráð í nýggja heimið fyri minnisveik við 8 plássum, sum eisini fer at lata upp nú í næstum. Í komandi ári verður so tann stóra útbyggingin av ellis- og røktarheiminum í Runavík liðug við 24 nýggjum plássum aftrat.

Sigast kann at av positivum orsøkum hevur heimarøktin í Eysturoynni kapisitetstrupulleikar nú í summartíðini og skal laga seg til tær nógv broyttu umstøðurnar sum verða táið hesi nógvu nýggju plássini koma aftrat við teim nýggju sambýlunum sum fara at lata upp nú. Tað eru tí nógvir bóltar í luftini, ein mennandi avbjóðing og stór uppgáva at lyfta í økinum, og roynt verður at laga seg til broyttu umstøðurnar soleiðis, at tænastan alla tíðina kann verða so góð sum yvirhøvur til ber.

Dagurin

6. august. Kristi dýrd. Dagurin verður hildin til minnis um Jesu umbroyting á fjallinum (Matt. 17, 1-9).

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasiða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

Petur Sofus Juul
vanliga nevndur Piddi
Søldarfirði

andaðist í heiminum mikunáttina 4. august.

Jarðarferðin verður úr Elim leygardagin 7. august kl. 14.00.

Vegna tey avvarðandi
Hansa

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Neyðarsligur Hoydal roynir at vaska sær hendur

Virgar T. Dalsgaard

Fyri góðum tveimum mánaðum síðani royndu teir báðir tjóðveldisprofetarnir Høgni Hoydal og økonomiska faktotum hansara, hagdrongurin Hermann Oskarsson at øsa danir heilt upp í varg við einum pubertilum, destruktivum og desorienterandi vekilsisfundi á Christiansborg. Fyrrnevndi Oskarssonur var í donskum radio sama morgun við grovum og sera ósakligum álopi á danska blokkpeningin. Hetta eru fakta, sjálvt um hesir báðir rædduskítar seinni eru farnir at vaska sær og turka ábyrgdina upp í onnur, eitt nú danskar fjølmiðlar.

Fáar dagar eftir fundin visti harra Høgni Hoydal í samrøðu við Á. Bertholdsen á Sosialinum at siga, at hetta fór als ikki at fáa nakrar fylgjur fyri viðurskiftini við Danmark.

Berlingska tíðindi kom tó stutt eftir við ógvisligari grein um, hvussu føroyskir fiskimenn, av bloksins ávum fingu skattalætta og dusaðu sær við ovurhonds lønum. Blokkpeningurin er annars í sínari tíð ætlaður sjúkrahúsum og socialum veitingum, og átti als einki at havt við fiskivinnuna at gera.

Hetta erkvisna temaið var í juli mánaði aftur tikið upp av danska TV 2, og teir høvdu aldri funnið uppá tað,

1) ***um ikki*** Høgni fyrst hevði skipað fyri vekilsismøtinum á Christiansborg,
2) og ***um ikki*** Hermann var farin í danska radio at gorra,
3) og ***um ikki*** greinin við tilfari frá Oskarsson var komin í Berlingaran.

Harra B. Højgaard, journalistur á Berlingaranum sigur seg, sum fyrr nevnt hava skrivað allar sínar greinir við beinleiðis upplýsingum frá Hermanni Oskarsson.

Hvør hevur nú skyldina í, at TV 2 er farið at fáast við hetta málið? Ja, svarið er einfalt - tað eru ikki danskir fjølmiðlar, sum kunnu lastast - teir renna bara tey ørindi, sum Høgni Hoydal og Hermann Oskarsson hava dyrgt eftir og næstan biðið teir um. Tí tað, sum um ræður hjá harra Høgna, er at fáa danir østar politiskt upp móti føroyingum. Ideologiski/og biological pápi Høgna, sum er fyrrverandi betongkommunistur og vanur við undirgravandi moldvørpuvirksemi næstan frá barnsbeini av, hevur sjálvur við politiskum hirðabrævi í síni tíð lagt soninum lag á, hvussu loysingarmenn við vilja skuldu søkja ta permanentu konfrontatiónina, ikki bara við Danmark og danir, men eisini við táverandi løgmannin, Anfinn Kallsberg! Hetta andstyggiliga bræv varð um somu tíð sent einum øðrum kendum meiningafabrikanti í Tjóðveldisflokkinum, nevniliga núverandi sjónvarpsstjóra okkara. Tað er nossligur fjølmiðlastjóri at hava sitandi! So ótrúverdugur og subjektivur tíðindamaður hevði alla aðrastaðni langt síðani verið sparkaður út á streymasjógv!

Høgni hevur á síni fjákutu ráðstevnu vágað sær at sett føroysku vælferðina í vanda og føroysk politisk álvarsmál á donsku politisku dagsskránna og hartil boðið donskum politikarum og fjølmiðlum, so teir fingu høvi til at leggja seg beinleiðis út í føroyskan politikk. Men hann leyp føroyska landsstýrið um. So ynkiligur er hann! Hoydal er næstan líka so neyðarsligur sum Jóannes Patursson, táið hann í 1937 fór grátandi til danska kongin, Kristian Tíggjunda og bað hann koma eftir føroyska løgtinginum, tí fólkavaldið ikki vildi boyggja seg fyri høvuðkambalyndi hansara.

– Harra Høgni sáaði vind, og nú heystar hann storm, og tí missir hann nervarnar, stakkalur!

Men tekur hesin samvitskuleysi politiski amatørur nú ábyrgdina av sínum vitleysa spæli við eldin? Nei, nei - tvørturímóti - á sín vanliga freika og fariseiska hátt, so vaskar hann sínar dálkaðu politisku hendur og gevur donskum fjølmiðlum og danska politikaranum, harra Thuesen Dahl skyldina! Men harragud, hava danir og serliga hr. Thuesen Dahl gjørt nakað annað enn júst tað, høgnamenn bóðu um? Kyniskir høgnesarar og hr. Thuesen Dahl draga avgjørt somu línu í hesum skitna máli!

Politiskur pyromanur

Charlatanurin, harra Høgni Hoydal er í løtuni í síni ómansligu støðu ikki frægari enn ein kyniskur pyromanur, sum hevur sett eld á eini stór hús, og sum so, tá ið húsini standa í ljósum loga, og fólk eru við at brenna inni, gongur handavríggjandi og hálvgrátandi kring húsini og smádeilir um, at tey, sum inni eru, sjálvi hava sett eld á. Hoydalshyklarin roynir enntá at seta trumf á við at látast vilja sløkkja eldin við kávalótum, og hetta vil hann hava fólk at trúgva, hóast hann enn hevur bæði svávulsdós og avdúkandi benzinklodda í hondini!

Men tað, at harra Høgni við krokodillutárum tætt við sjálvt bálið er tikin við rúkandi svávulspinni í hendi, er ikki nógmikið til at fáa henda forstokkaða falsara av veruleikanum til at viðganga nakað sum helst, nei, nei, - tað eru sum hjá øllum narcissistum og óflýggjaligum óvitum altíð onkur onnur og hini, sum hava skyldina. Har, sum eingin er æran, er heldur eingin skommin!

Millum annað verjir harra Høgni seg við, at danskir fjølmiðlar vita ov lítið um Føroyar - gaman í, - men HVOR hevur ábyrgdina av tí? Eru tað ikki júst høgnamenn, sum eitt nú Sjúrður Skaale og Øssur Winthereig saman við meginpartinum av Hoydals-familjuni, sum regluliga troðka seg fram í donskum fjølmiðlum og geva bæði donskum journalistum og vanligum dønum eina fulkomuliga avskeplaða mynd av Føroyum og politiska gerandisdegnum har. Sjálvt tá ið danskir journalistar eru í Føroyum, sleppa teir treyðugt at tosa við onnur enn teir føstu Tordenskjolds soldátarnar, teir frelstu missionerarnar, sum allir eru meira og minni rabiatir loysingarmenn, Danskir tíðindamenn verða loftaðir av høgnamonnum og síðani pakkaðir inn, so eingin ófrelstur sambandsmaður hittir teir. Tað eru nógv dømi um hetta, - tjóðveldisreiðrini í út- og sjónvarpi

Ansa væl eftir, at bara tað fundamentalistiska liðið sleppur framat dønum! Abyrgdin liggur tí fyrst og fremst hjá meiningamonopolinum hjá fullveldismeinigheitini - tað eru avgjørt høgnesisku monopolmenninir innan tíðindaflutning, sum hava bróðurpartin av skylduni av, at donsk media eru so illa orienteraði um føroysk viðurskifti! Men miðlafólkið skulkar sær altíð undan. Tey eru somikið naiv, at tey halda ongantíð, at søgan fer at verða skrivað um teirra ússaliga atburð! Men einki fer heilt undir flag, og nógv eru tey, ið fara at leggja sær væl í geyma!

Høvdu *renning undan ábyrgd, veruleikaflýggjan* og *politiskt handavask* verið olympiskir kappingarleikir, høvdu leiðandi tjóðveldismenn nú sum fyrr altíð verið favorittar til at fingið flest gullmedaljur!

Alt hetta óneyðuga rokið kom av barnsliga Christianborgar-fundinum hjá Høgna - og hvat hendi so har? Jú, frú *Bodil Nyboe Andersen,* nationalbankastjóri helt eina fitta røðu, sum eins væl kundi staðið í bløðunum - har var einki nýtt í. Hon staðfesti bara, hvat flestøll vita, at ein sjálvstøðug føroysk valuta vildi verið óðamannaverk! Ein íslendskur professari fortaldi, at tað hevði verið skilagott at farið upp í EU - hetta kom dáttliga við, og dámdi høgnesarum stak illa, og teir royndu tí fjáltursskotnir heilt at tiga og krógva íslendingin burtur! Astrup, bankastjóri fekk eisini sagt okkurt lítið, sum seinni er nógv misbrúkt, m. a. av SSi! Orðini hjá Oskarsson vóru heilt privat sjónarmið, sum ikki kunnu standa einsamøll, tí tey ikki eru annað enn sjónarmið og avgjørt ikki sakliga undirbygd fakta!

Annars var alt hitt sjáldsama lítið vert - røðurnar vóru banalitetir og tómar almindiligheitir, og sjálvt um tað sjálvandi er stuttligt hjá føroyskum breyðpolitikarum og sera forvitnisligt hjá einum íslendingi at fáa eina ókeypis og avgjørt stuttliga keypmannahavnarferð, er tað ikki nóg mikið grundarlag til politiskt at seta eld á millum londini!

Allarflestu føroyingar duga ikki at sígga nakað upplýsingarviðri í slíkum tiltaki, og teir spyrja tí undrandi, hvat í allari víðu verð handa steinbýtta og innihaldsleysa ráðstevnan skuldi til. Destruktivi Christiansborgarfundurin, sum danir noyddust at finansiera, hevur higartil bert problematiserað og gruggað viðurskiftini við Danmark! Og mundi tað ikki, tá ið saman um kemur, vera tað einasta skammiliga endamálið Um so er, má hetta politiska pyromanarbeiðið hjá konfliktsøkjandi tjóðveldismonnum í Danmark halda uppat, ongantíð ov skjótt! - Teir gera øllum føroyingum fyri skommum við sínum levnaði á Christiansborg!

Hvussu leingi vil føroyska landsstýrið finna seg í, at teir fáa sítt strævna arbeiði beinleiðis saboteræð av ábyrgdarleysum politiskum óvitum sum Høgna Hoydal, Sjúrða Skaale og Hermanni Oskarsson? Og hvussu leingi vil meirilutin av føroyska fólkinum finna seg í, at forkeleðir føroyskir politiskir playboys og grønlendskir ditto eru við at innrætta sær ein politiskan grulvigarð á Christiansborg, haðani teir mjólka og mergsúgva danska skattgjaldaran fyri blóðpening til at finansiera sín privata fólkatings-blokk til politiskt spølni og rukkulevnað?

Norðuratlantiski óvitaklubbin hevur snúltað sær til meira enn 700.000 krónur pr. mann um árið út yvir tað, sum ein vanligur danskur fólkatingslimur fær - hetta er stór skomm fyri bæði Grønland og Føroyar!

Tjóðveldisflokkurin fer ongantíð at "skikka sær væl"!

Kai Vágfjall

Havi sitið og lurtað eftir orðaskiftinum á tingi um løgmansrøðuna. Har viðgjørdi Óli Breckmann Tjóðveldisflokkin í eini talu, í staðin fyri at viðgera evnið, sum jú var løgmansrøðan. Sjálvandi, tá ið soðið er so tunt, og eingir bollar eru í súpanini, er ikki nógv at viðgera har, so tað er ein funnin fressur, at sleppa at dálka Tjóðveldisflokkin út í staðin.

Óli segði, at eingin vil í samgongu við Tjóðveldisflokkin, bara Fólkaflokkurin vil kanska um nøkur ár, um Tjóðveldisflokkurin fer at »skikka sær væl«, sum hann málbar seg. At »skikka sær væl« merkir í Fólkafloksins høpi eftir øllum at dømna, at Tjóðveldisflokkurin skal góðtaka kriminalitet, vina- og kenningapolitik o. a. óreint, sum hesin flokkur tykist at vælsigna. Hetta fer Tjóðveldisflokkurin ongantíð at gera. Kanska hevur Fólkaflokkurin fingið hasar báðar sambandsflokkarnar at »skikka sær væl«, tí hálsfevnast teir so væl ídag.

Eisini fannst Óli at Tjóðveldisflokkinum, tí hann ikki vildi góðtaka Anfinn Kallsberg sum løgmann. Rætt er tað, men tað vildu hasir báðir sambandsflokkarnar, sum teir sita í samgongu við nú, heldur ikki.

Jokarin

Havi eisini lurtað eftir nýggja og unga manninum hjá Javnaðarflokkinum. Helt at hesin fór at geva flokkinum nakað av nýggjum íblástri, men jokarin, sum formaður Javnaðarfloksins hálaði úr ermuni stutt undan valinum, gjørdist eitt satt vónbrot. Tá ein lesur tað, hann hevur skrivað í bløðunum og hevur hoyrt hansara røður og viðmerkingar á tingi hesar síðstu dagarnar, kann ein bara staðfesta, at her er einki nýtt ella skilagott at heinta. Havi varhugan av, at hann heldur seg vera sera stuttligan, tí hann flennur altíð einsamallur, tá hann kemur við onkrum, sum hann heldur vera stuttligt. Fyri mær virkar hann ikki at vera annað enn ein sjálvtilnevndur klovnur. Ja, ein jokari, í orðsins sanna týdningi. Mangur fer upp á tjólegg og dettur niður á langlegg.